

Enn ein nýggju oljurisi, Deepsea Aberdeen ávegis til leiðirnar millum Hetland og Føroyar at bora

# BP fremur risaútbyggingar nær føroyska markið

Deil:

**Jan Müller**

13.02.2015 - 16:27

Oljan.fo

Ikki færri enn tveir spildurnýggir boripallar eru ávegis til Atlantsmótið, økið millum Føroyar og Hetland, har teir komandi árini skulu bora eitt stórt tal av brunnum, hvørs endamál er at menna og vaksa um oljuvirksemið vestan fyri Hetland.

Pallarnir, sum teljast millum heimsins størstu av sínum slag, eru serstakliga bygdir til at kunna arbeiða í havøkjum við stórum dýpi og sera ringum veðri.

Tað eru tvey av teimum mest virknu oljufeløgunum, sum arbeiða á Atlantsmótinum, og millum heimsins størstu,BP og Chevron, ið skulu brúka pallarnar til at bora rættiliga nógvar nýggjar brunnar í økinum.

BP er høvuðsspælarin á Atlantsmótinum, og tað felagið, sum heldur grýtuni á kók.Men mong onnur feløg eru eisini við. Felagið hevur longu brúkt hundraðtals mia. kr. til at byggja út oljukeldur í hesum økinum og er í løtuni í gongd við bæði nýggjar útbyggingar og nýggja leiting. Ein sannroynd, sum uttan iva eisini hevur stóran áhuga í Føroyum, næsta granna hjá vaksandi oljuvirkseminum eystan fyri markið. Ein kann nokk loyva sær at siga, at soleingi tað er lív og gongd í oljuvirkseminum eystan fyri markið, so leingi er eisini lív í vónunum at finna olju og gass í Føroyum eisini.

Pallurin, sum BP hevur leigað í sjey ár frá Odfjell Drilling, eitur Deepsea Aberdeen er í løtuni á veg til økið millum Hetland og Føroyar. Tað var hesin pallurin, sum fyri tíð síðani, rætt og slætt koppaði í suðurkoreanskari havn, har hann varð gjørdur klárur til longu ferðina úr Asia til Evropa.

Hann sigst koma fram um einar seks vikur og skal hann komandi árini bora ikki færri enn 25 brunnar á Schiehallion oljukelduni, eisini nevnd Quad 204, komandi sjey árini.

Útbyggingin fevnir um eitt nýtt FPSO framleiðslu- og goymsluskip og eina rúgvu av útbúnaði á havbotninum. Útbyggingin fer at kosta nógvar tíggjutals mia. kr. og bara avtalan við norska Odfjell, sum er tann størsta nakrantíð hjá felagnum í 40 ár, er uppá góðar 7 mia. kr. Nýggja FPSO-skipið verður klárt í 2016.

Tað sigur ikki so lítið um hesa útbyggingarætlanina, at man bæði byggir eitt nýtt framleiðsluskip og ein boripall. Schiehallion oljukeldan var funnin í 1993 og fór undir framleiðslu longu í 1998. Hon telist millum størstu framleiðandi keldurnar í Europa og hevur alstóran týdning fyri Bretland.

Feløgini, sum eru við, eru umframt BP, eisini Shell, Statoil og OMV. Hesi bæði seinastu eru framvegis partur av føroysku leitingini.

Umframt hesa risastóru útbygging av einum at risakeldunum eystan fyri føroyska markið (einans 35 km. frá markinum), so arbeiðir BP eisini við enn eini útbygging av størsta oljufeltinum í Evropa, Clair, sum liggur nakað norðan fyri Schiehallion. Her verður næsta oljufeltið, Clair Ridge, bygt út í løtuni. Um somu tíð fyrreikar BP eisini eina boriverkætlan við 12 leiti- og avmarkingarbrunnum á tí stóra Clair feltinum og nærhendis, sum skal kunna finna fram til besta plássið at fara undir enn eina útbygging, soleiðis at tað um nøkur ár verða 3 ymiskar framleiðslueindir á Clair feltinum.

Lesið eisini komandi greinar um enn ein boripall til Atlantsmótið og um jaligu støðuna hjá fronskum oljurisa til økið millum Hetland og føroyska markið.


Iceland
Norge
Norway
North Sea
Danmark